# Gjaldið avgerandi

**– Talan skal vera um eina lýsing, ið lýsarin hevur goldið fyri, skal hon verða ólóglig sambært rúsdrekkalógini, sigur Finn Ougaard**

RÚSDREKKA/ANALYSA
*Heri á Røgvi*

Í Løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka stendur soleiðis at lesa:

§ 19. Øll reklama í føroyskum fjølmiðlum og tíðarritum, útbýting av reklamuseðlum o.t. viðvíkjandi sølu, skeinking og útflýggjan av rúsdrekka er forboðin.

Hetta er eisini kjarnin í tí so nógv umtalaðu Restorffs málinum, og hetta verður eisini grundarlagið í ákæruni í komandi rættarmálinum móti Føroya Bjór, sum skal byrja í næstum í Føroya Rætti.

Tað er § 19., sum sorinskrivarin metir, at Restorffs bryggjarí breyt við teirra lýsing, sum snúði seg um páskaløg og orðið "øl" varð eisini á lýsingini.

Sorinskrivarin, Jørgen B. Petersen, metti – útfrá einari samlaðari meting – at talan var um brot á lógina, og álegði tískil Restorffs bryggjarí at gjalda 10.000 kr. í bót umframt sakarmálskostnaðin.

Útfrá dóminum, sum vit bert hava fingið endurgivnan, kann lesast, hvat dómarin leggur í § 19. Hann metir útfrá sjálvari lýsningini og próvførsluni í rættinum, at hugsað verður um øl við lýsingini, og hetta er greitt brot á lógina.

Tað, sum hinvegin er kanska enn meira áhugavert, er tulkingin hjá fútanum í málinum. Tað er fútin, ið ákærumyndugleiki, og hansara tulkingar av lógini eru sostatt avgerandi fyri, hvat kemur fyri dagin í Føroya rætti. Verður eitt mál fráboðað fútanum, so hevur fútin skyldu til at kanna málið. Um hann heldur tað vera neyðugt, skal hann eisini reisa ákæru.

Eitt nú sendi Restorffs bryggjarí fútanum ein fyrispurning um lýsingar hjá Føroya Bjór, og hetta gjørdi, at fútin fór undir at kanna hesar lýsingar og seinni eisini reisti ákæru.

Á rættarfundi í málinum millum ákæran og Restorffs kom fram, at fútin tulkar § 19 soleiðis, at talan skal vera um ein hópfjølmiðil, eitt nú Dimmalætting og Sosialurin, ella eitt tíðarrit, t.e. eitthvørt, sum kemur út regluliga.

Nevnt varð eisini lýsingar fyri sterkum øli í Álmunakkanum fyri nøkrum árum síðani. Hetta sær fútin einki skeivt í. Orsøkin er tann, at Álmunakkin ikki er nakar fjølmiðil, og hann kann heldur ikki metast sum eitt tíðarrit. Við øðrum orðum ber so til at staðfesta, at í einari føroyska útgávu, eitt nú árbøkur ella líknandi, ber væl til at lýsa við sterkum øli ella brennivíni.

Í § 19 stendur eisini orðið "reklama" at lesa.

— Talan skal vera um eina lýsing, ið lýsarin hevur goldið fyri, skal hon verða ólóglig sambært rúsdrekkalógini, segði Finn Ougaard, varafúti, eftir at dómurin varð sagdur í Restorffs málinum.

Er talan hinvegin um redaktionelt journalistiskt tilfar, kann einki forboð setast ímóti at vísa og viðgera rúsdrekka av sterkara slagnum.



*So leingi goldið ikki verður fyri tað av einum lýsara, kunnu fjølmiðlarnir vísa, hvat teir hava hug til um rúsdrekka. Eitt nú í hesum førinum við Okkara Kokkum í SvF, har greitt verður frá um hóskandi vínsløg*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Leiðslan á Restorffs fekk greitt at vita, at teir mugu halda seg til tíðindafundir og annað líknandi, um teir skulu fáa umtalu um teirra sterka løg*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Ivi um russisku ákærurnar ímóti Akhmed Zakajev

**Danskir løgfrøðingar og mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch ivast í teimum ákærunum, sum russisku myndugleikarnir hava ímóti kekenska politikaranum Akhmed Zakajev, sum situr varðhaldsfongslaður í Danmark**

ZAKAJEV-MÁLIÐ
*Árni Joensen*



*Akhmed Zakajev*

*Mynd: Reuters*

Líka síðani kríggið í Kekenia byrjaði, hevur mannarættindafelagsskapurin Human Rigvhts Watch víst á og prógvað, at báðir partar í krígnum hava framt krígsbrotsverk, men felagsskapurin sigur seg ikki hava nakað tilfar, sum bendir á, at Akhmed Zakajev er sekur í krígsbrotsverki.

Týsdagin handaði almenni russiski ákærin danska løgmálaráðharranum, Lenu Espersen, nýtt tilfar í málinum, og hetta tilfar fer løgmálaráðið í Keypmannahavn nú at kannað.

Kekenia-serfrøðingurin hjá Human Rights Watch, Dietrich Lohman, segði í gjár, at tað verður ógvuliga trupult hjá russisku myndugleikunum at legja fram próvtilfar, sum kann fáa ein danskan dómstól til at gera av at útflýggja russum Akhmed Zakajev.

- Tað tilfarið, sum vit higartil hava sæð, tykist ógvuliga veikt. Tað avgerandi er, at russar kunnu prógva, at Zakajev veruliga hevur eftirlit við sínum deildum, og at hann veruliga hevur givið beinleiðis boð um krígsbrotsverk. Tað undrar meg, hava russar tílík prógv, sigur Dietrich Lohman.

Russisku myndugleikarnir hava fyrr sagt, at Zakajev var við til at leggja gíslatøkuna í Moskva herfyri til rættis, men sum skilst hava teir ikki latið dønum nakað tilfar, sum snýr seg um tað málið.

## Danir ivast eisini

Í Danmark halda fleiri løgfrøðingar, at tað seinasta russiska próvtilfarið er ikki nóg mikið, til at teir kunnu krevja kekenska varaforsætisráðharran útflýggjaðan.

Jens Vedsted-Hansen, professari á lærda háskúlanum í Århus, heldur, at russisku myndugleikarnir standa veikir í málinum ímóti Akhmed Zakajev. Hann vísir á, at tær ákærurnar, sum russar nú eru komnir við, snúgva seg um tilburðir undir tí fyrra krígnum í Kekenia, og at kekenar sambært einum sáttmála við russar ikki kunnu dragast til svars fyri tað, sum tá hendi.

Jørn Vestergaard, lektari á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, undrast á, at russar høvdu einki ímóti at tingast við Zakajev í Moskva fyri einum ári síðani, og at teir nú krevja hann útflýggjaðan sum yvirgangsmann.

Eva Smith, professari á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, heftir seg serliga við, at russar eru ikki komnir við nøkrum tilfari, sum knýtir Zakajev at gíslatøkuni í Moskva, hóast teir fyrr hava sagt, at hann var við til at fyrireika gíslatøkuna. Eva Smith ivast tí í, at russar yvirhøvur hava nakað tilfar í hesum málinum, og sum heild heldur hon russisku ákærurnar vera veikar.

## Ákærurnar

Tær seinastu russisku ákærurnar ímóti Akhmed Zakajev snúgva seg um tilburðir miðskeiðis í nítiárunum. Sagt verður, at Zakajev stóð á odda fyri einum brotsmannabólki, sum framdi fleiri brotsverk og yvirgangsatsóknir:

Í oktober í 1995 burturflutti liðið hjá Zakajev tveir medarbeiðarar hjá russiska ákæruvaldinum. Tað eydnaðist at fría teir.

Í januar í 1996 burturflutti liðið tveir prestar, sum seinni vórðu funnir skotnir.

Í mars í 1996 hersetti liðið hjá Zakajev eina lítla herstøð í Grosnij. Meiri enn tíggju russiskir hermenn doyðu.

Í august í 1996 hersettu Zakajev og menn hansara eina jarnbreytarstøð í Grosnij. Meiri enn 300 løgreglumenn vórðu særdir.

Herumframt vilja russar vera við, at Zakajev og menn hansara framdu fleiri krígsbrotsverk í økinum Urus Martan, og at fleiri sivilfólk doyðu. Eisini siga teir, at Zakajev nýtti kjallaran í sínum egnu húsum til fongsul. Har vóru bæði særdir og deyðir russiskir hermenn og løgreglumenn, sum vórðu latnir teirra avvarandi ímóti loysigjaldi.



# Færri tilboð í heilsuverkinum

**Játtanin til serviðgerð uttanlanda gerst støðugt dýrari, og tí er neyðugt at endurskoða lógina og áseta eitt loft yvir, hvørjar viðgerðir á sjúkrahúsum uttanlands, føroyska heilsuverkið vil gjalda fyri. Tað sigur Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum, sum kann staðfesta eina meirnýtslu á hesi játtan uppá 20 milliónir krónur, sammett við játtanina á fíggjarlógini**

HEILSUVERK
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*- Vit kunnu bara staðfesta, at seinastu árini er játtanin til serviðgerðir uttanlanda nógv økt. Skal gongdin ikki halda fram, mugu vit gera okkum greitt, hvar støðið skal liggja, og hvørji tilboð vit hava ráð til at gjalda, sigur Bill Justinussen landsstýrismaður í heilsumálum. Eisini skal sjúkrahúslógin broytast, so avgerðarrættur og fíggjarlig ábyrgd fylgjast.*

Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum, noyðist at biðja løgtingið um 20 milliónir krónur afturat, til at gjalda fyri ta viðgerð, ið føroyingar fáa á sjúkrahúsum uttanlands. Talan er um viðgerðir, ið føroyska heilsuverkið ikki sjálvt megnar at bjóða.

Føroyska sjúkrahúslógin heimilar yvirlæknum at senda sjúklingar til Danmarkar til viðgerðar, um so er, at viðgerð ikki kann veitast í Føroyum. Tilsamans 60 milliónir krónur eru settar av á fíggjarlógini í ár til endamálið. Men nú árið fer at halla, vísir tað seg, at samlaða rokningin fyri at senda føroyingar til viðgerð uttanlands kemur upp á 80 milliónir krónur.

Bill Justinussen vísir á, at sjúkrahúslógin heimilar yvirlæknum at senda sjúklingar og avvarandi uttanlands, gerst tað neyðugt, og tí slepst ikki undan at játta 20 milliónir afturat til hesa konto í ár. Landsstýrismaðurin í heilsumálum vísir á, at samsvar er ikki millum heimild og ábyrgd á hesum øki, tí meðan tað er læknin, sum avgerð, hvussu nógv skulu sendast av landinum at fáa viðgerð, so er tað landsstýrismaðurin, sum hevur fíggjarligu ábyrgdina. Bill Justinussen leggur afturat, at sum lógin er smíðað, so gevur hon læknunum óavmarkaða heimild at senda sjúklingar av landinum til viðgerðar, tá teir meta tørvin vera til staðar. Henda heimild bindur landskassan til at gjalda rokningina, eisini um hon fer uppum játtanina á fíggjarlógini.

Og tað eru hesi viðurskifti, sum landsstýrismaðurin í heilsumálum ætlar sær at broyta. Hann vísir á, at lógin skal broytast, so samsvar er millum tann, ið tekur avgerðina, og tann, ið hevur fíggjarligu ábyrgdina. Sum dømi um eina loysn nevnir Bill Justinussen at ein nevnd, millum annað umboðað við læknum og myndugleikum, kundi gjørt av, hvør skal fáa viðgerð uttanlands. Henda nevnd skuldi so eisini havt ábyrgdina av, at játtanin verður hildin. Bill Justinussen ásannar tó, at tíðun kann vera trupult, fyri ikki at siga ógjørligt, neyvt at áseta eina játtan til hetta øki.

- Tað fer altíð at vera trupult at halda seg til játtanina, tí her er talan um eitt øki, har nýggir og betri, men ofta eisini dýrari, viðgerðarháttir verða mentir, umframt at tað kann kann vera misjavnt, hvussu nógv fólk hava tørv á viðgerð, vísir Bill Justinussen á.

## Fólk skulu sjálvi gjalda

Í Heilsumálaráðnum verður í løtuni arbeitt við at broyta sjúkrahúslógina, so avgerð og fíggjarlig ábyrgd verða tvinnað saman. Tað vil siga, at myndugleikin, ið sendir sjúklingar av landinum, eisini hevur ábyrgdina av at halda játtanina. Ein týðandi partur av hesum arbeiði er at finna út av, hvar tænastustøði í føroyska heilsuverkinum skal liggja. Ella við øðrum orðum: hvørjar viðgerðir, ið føroyingar fáa uttanlanda, heilsuverkið skal gjalda fyri, og hvat fólk sjálvi skulu gjalda fyri. Hetta eru spurningar, ið Bill Justinussen vil hava reistar í løgtinginum.

- Vit eru í dag í tí støðu, at játtanin til serviðgerðir uttanlands bara hækkar og hækkar. Tí noyðist løgtingið at siga, hvat vit hava ráð til, og hvat føroyska heilsuverkið skal bjóða í framtíðini, sigur Bill Justinussen.

Sjálvur er landsstýrismaðurin longu farin í holt við at kanna, hvussu til ber at tálma nýtsluni av serviðgerðum, ið føroyska heilsuverkið keypir uttanlands. Hann nevnir tvey dømi um viðgerðir, har heilsuverkið, tvs. landskassin, í dag betalir fyri viðgerðina, og tí eru ókeypis fyri brúkaran.

- Í dag rindar heilsuverkið millum annað fyri at fólk, ið ikki kunnu gerast við barn, kunnu fáa ísáðing ella »kunstig befrugtning« í Danmark. Hetta er ein viðgerð, ið kanska kostar umleið 40.000 krónur, men sum er ókeypis fyri brúkaran. Her mugu vit spyrja, hvørt tað er rætt, at føroyska heilsuverkið skal gjalda, ella at brúkarin sjálvur skal gjalda fyri hesa viðgerð, eins og gjørt verður t.d. í Norra, vísir Bill Justinussen á, og nevnir sum annað dømi, at heilsuverkið í dag rindar fyri at fólk, ið eru sera sjónveik, kunnu fáa ókeypis eygnaviðgerð í Danmark.

- Vit noyðast at seta okkum sjálvum spurningin, hvørjar tænastur heilsuverkið skal gjalda, og hvat fólk sjálvi mugu gjalda. Í dag er játtanin til serviðgerðir uttanlands nærum at rokna sum ein »blancocheckur«, av tí at vit politiskt ikki hava gjørt okkum greitt, hvar tænastustøðið í heilsuverkinum skal liggja, sigur Bill Justinussen.

Landsstýrismaðurin í heilsumálum leggur dent á, at tá talan er um akuttar viðgerðir, so skal sjálvandi eingin ivi vera um, at viðgerðin uttanlanda skal vera ókeypis. Men neyðugt er at gera sær greitt, hvussu nógv tað almenna megnar at gjalda til viðgerðir uttanlands. Bill Justinussen metir kortini ikki, at hansara ætlan beinleiðis fer at lækka tænastustøði, ið føroyska heilsuverkið bjóðar fólkinum.

- Tað er ein spurningur um at leggja eitt støði fyri, hvat vit megna at gjalda. Av tí at nýggj viðgerðartilboð av ymsum slag koma alla tíðina, kann tænastustøðið so við og við gerast sera høgt, og harvið eisini rokningin til landskassan, skulu øll tilboð vera ókeypis. Tí mugu vit gera okkum greitt, hvat vit hava ráð til at gjalda fyri, sigur Bill Justinussen.

# Pengarnir skulu játtast

**Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum, hevur boðað Fíggjarmálaráðnum og restina av landsstýrinum frá, at hann hevur tørv á 20 milliónum krónum afturat í ár. Pengarnir koma við í eykajáttanarlóg fyri november, sum verður løgd fyri løgtingið í næstu viku.**

HEILSUVERK
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Neyðugt verður at játta 20 milliónir krónur afturat til serviðgerðir uttanlanda í eini eykajáttanarlóg, ið verður løgd fyri løgtingið seinni í hesum mánaðinum. Bill Justinussen hevur boðað Fíggjarmálaráðnum og restina av landsstýrinum frá, at tørvur er á pengunum. Landsstýris-maðurin í heilsumálum vísir á, at tað slepst snøgt sagt ikki undan at játta pengarnar.

- Vit hava eina lóg, ið heimilar læknunum at senda sjúklingar av landinum til viðgerðar, tá teir meta tað vera neyðugt. Tí noyðast vit eisini at gjalda fyri tað, eisini um upprunaliga játtanin á fíggjarlógini ikki verður hildin, vísir Bill Justinussen á.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, leggur í hesum døgum síðstu hond á eina eykajáttanarlóg fyri november. Ætlanin er at savna allar játtanir, ið ikki eru brúktar, og eisini møguligar meirnýtslur í hesi eykajáttanarlóg, ið hann væntandi fer at leggja fyri Løgtingið um eina viku ella so.

Karsten Hansen sigur, at tær 20 milliónirnar til serviðgerðir uttanlanda verða við í hesi eykajáttanarlóg fyri november.

- Vit mugu bara staðfesta, at pengarnir eru brúktir, og tí verður neyðugt við eini eykajáttan uppá 20 milliónir krónur. Karsten Hansen er í løtuni í holt við at smíðja eykajáttanarlógina, og tí er ov tíðliga at siga, hvar tær 20 milliónirnar skulu finnast, sigur hann. Hann vísir á, at antin mugu pengarnir finnast á øðrum játtanum, ella má fíggjarlógin hækkast.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur áður boðað frá, at í ár fara millum 40 og 45 milliónir krónur at leypa av á ymsum játtanum, ið ætlandi skulu flytast til ymsar íløgur næsta ár, m.a. Norðoyatunnilin. Karsten Hansen sigur, at talan verður ikki um at skerja íløgur næsta ár burtur av hesi orsøk.

- Her er talan um eina rakstrarjáttan, ið ikki er hildin. Vanliga verða íløgu- og rakstarjáttanir ikki samantvinnaðar, og tí mugu vit finna pengarnar aðrastaðni, sigur Karsten Hansen.

Landsstýrismaðurin fer væntandi at leggja eykajáttanina fyri løgtingið í næstu viku. Enn er ov tíðliga at siga, hvussu stór samlaða eykajáttanin fyri november verður, tí fyrireikandi arbeiðið er ikki liðugt enn, sigur Karsten Hansen.

## Sami trupulleiki næsta ár

Á fíggjarlógini fyri í ár eru 60 milliónir krónur játtaðar til serviðgerðir uttanlanda, og sum nevnt er hetta talið 20 milliónir ov lágt. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár eru 70 milliónir settar av til endamálið. Sostætt koma 10 milliónir krónur at mangla í, um útreiðslan næsta ár verður tann sama sum í ár.